Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

Á DR1 í kvøld kl. 20.30

# Apollo 13



Filmurin er grundaður á veruligu hendingarnar í 1970, tá rúmdarferjan Apollo 13 fór á eina mánaferð, ið miseydnaðist

Spenningsfilmurin Apollo 13 er grundaður á veruligar hendingar. Á veg til mánan er kemur ólag á skipanirnar umborð á rúmdarfarinum Apollo 13. Møguleikarnir hjá teimum umborð at venda aftur til jørðini gerast alsamt færri sum tíðin gongur. Meðan Tom Hanks er ovasti myndugleiki umborð á rúmdarfarinum, er Ed Harris á odda fyri royndini á jørðini at fáa rúmdarfarið niður aftur á jørð í øllum góðum. Komnir væl áleiðis á ferðini kemur hol á ein súrevnistanga. Teir síggja nú, hvussu iltin sprænir út úr rúmdarfarinum og út í rúmdina - eitt týðuligt tekin um at lívið er í vanda. Mánalendingin er tískil ikki møgulig, nú snýr tað seg um at bjarga manningini - teimum trimum, Jim Lowell (Tom Hanks), Fred Haise og Ken Mattingly. Óhappið hevur m.a. við sær at rúmdarferjan ikki hevur nóg mikið av orku at venda sær sjálvari móti jørðini aftur. Teir halda so fram á ferðini kring mánan fyri at brúka tyngdarmegina á mánan til at senda skútuna ímóti jørðini. Rúmdarferðin varar í sjey dagar, fimm av døgunum innibera allir álvarsligar trupulleikar, ið krevja skjótar loysnir. Tað skal av álvara sparast uppá súrevnið og ymisku skipanirnar umborð mugu sløkkjast. Av serligum týdningi er tað, at teir koma rætt inn í atmosferuna, tí annars er vandi fyri at ferjan beinleiðis brennir upp.



Ron Howard hevur leikstjórnað m.a. Tom Hanks í Apollo 13. Hesir báðir samstarva eisini í komandi filminum, ið er gjørdur eftir kendu skaldsøguni hjá Dan Brown "The Da Vinci Mystery"

# Deyðin klæðir henni

Á Kanal 5 mikukvøldið kl. 20.00



Ernest Menville er lýtalækni og fangaður mitt í rokinum millum tvey konufólk, ið gera alt fyri at fáa hendur á hansara ríkidømi

Vinalagið millum Madeleine Ashton (Meryl Streep), ein eldri sjónleikarinna, og rithøvundan Helen Sharp (Goldie Hawn) verður av álvara set á eina roynd. Hesar báðar koma nevniliga at kappast um sama mannin - ein rættiliga ríkur, men kortini eitt sindur miseydnaður, Ernest Menville (Bruce Willis), ið starvast sum lýtalækni. Tað er Madeline, ið fer við fonginum og Ernesti. Og so er Helen púra fyri ongum. Hon fer at eta sum eitt øt og endar á lukkaðu deild, tá er hon longu vorðin so stór sum eitt fjall. Men fleiri ár seinni er hjúnarbandið hjá Madeleine og Ernest líkt eini syrgiligari rutinu. Hon stríðist ímóti tíðarinnar tonn, ímeðan Ernest finnur troyst í arbeiðinum og í fløskuni. Brádliga ein dagin hittast tær báðar, Helen og Madeleine. Helen sær út til at vera nógv yngri, hon hevur tapt seg fleiri kilo og vorðin so stásilig sum ongantíð fyrr. Madeleine hugsar nú, at Helen fer at taka Ernest frá henni. Og hetta orkar hon ikki at hugsa, tí Ernest er jú hennara egni lýtalækni. Hon fær so fatur á tí vøkru tróllkvinnuni Lisle, ið gevur henni av einum undurdrykki. Av hesum fær hon ungdóm og vakurleika. Men skjótt varnast hon, at Helen eisini hevur drukkið av hesum undurdrykki, og somuleiðis gerst hon greið yvir, at ungdómur og vakurleiki báðir hava sín ræðuliga prís.



Helen (Goldie Hawn) drekkur av einum undurdrykki, ið ger hana yngri og vakrari